# minst av orku




*– Vit hava í sambandi við hesa verkætlan sett okkum sum mál at minka 10 prosent í orkubrúki næstu tvey árini, men tað merkir als ikki, at vit so fara at seta okkum upp aftur á. Tað snýr seg um hvønn dag at verja umhvørvið sum mest, sigur Eyðfinn Egholm, stjóri hjá MEST*

*Mynd: Leif Láad*

**FAKTA UM EYÐFINN EGHOLM**

**Stjóri á skipasmiðjusamtakinum MEST**
**59 ár**
**Sivilverkfrøðingur og HD í fígging**
**Arbeiðsroyndir:**
**1976-79 De Danske Sukkerfabrikker**
**1979-1993 Teknicon, føroysk felag. Partaeigari og leiðari.**
**1993-2008 Danisco Sugar – seinnu árini tekniskur leiðari fyri Danisco Sugar Nykøbing**
**2008- MEST**

vilja styrkja um tilverurættin hjá sær. Eyðfinn Egholm er ikki heilt samdur.

- Tað kann gott vera, at júst umhvørvisspurningurin í mun til ymiskt annað hevur verið nógv á breddanum seinnu árini, men hetta er ein týdningarmikil spurningur, sum øll – eisini føroyingar – eiga at taka støðu til. Vilja vit í Føroyum vera partur av altjóða samfelagnum, og tora at hyggja upp á okkara grannar og fólk longri úti í heimi, mugu vit vísa ábyrgd, sigur hann.

Men hvussu so við teimum, sum siga, at allar hesar umhvørvismerkingarnar bara verða brúktar sum gott PR hjá framleiðslufyritøkum?

- Tað er rætt, at umhvørvismerkingar kunnu brúkast, tá ein fyritøka skal marknaðarførast, men eg dugi ikki at síggja nakað skeivt í at vísa viðskiftafólki bæði innanlands og uttanlands, at ein fyritøka kennir ábyrgd yvirfyri umhvørvinum. Slík tekin vísa jú samstundis, at talan er um eina fyritøku, sum tekur seg sjálva í álvara, og tá skal ikki so nógv til hjá kundanum, fyri at hann kemur til tað niðurstøðu, at fyritøkan eisini tekur kundan í álvara, sigur MEST-stjórin.

## Skráseting og stýring

Men hvussu ætlar MEST so ítøkiliga at fáa orkubrúkið niður við 10 prosentum næstu tvey árini, og samstundis veksa um virksemi sítt?

Ja, talan er ikki um nakran gandafrymil. Í veruleikanum skal ikki meira til – í fyrstani – enn at skráseta alt orkubrúkið í fyritøkuni, og so greina tey tøl, sum funnið verður framt til. Tølini fara at vísa, um brúkið er óneyðuga stórt á summum økjum í fyritøkuni. MEST hevur skrásett samlaða orkubrúkið hjá fyritøkuni í fjør og higartil í ár, og sum dømi um eitt øki, har tað kann setast inn beinanvegin, nevnir Eyðfinn Egholm nøkur av sethúsunum, sum fyritøkan eigur.

- Hús, sum eru um somu stødd, brúka sera ymiskar nøgdir av olju til upphiting. Her kann vera talan um ov illa bjálvað hús, ov skilaleyst brúk, ella ein kombinatión av hesum. Í øllum førum kunnu vit fara í gongd beinanvegin við ábøtum, og líknandi broytingar kunnu eisini gerast á størri økjum í fyritøkuni, sigur Eyðfinn Egholm.

Tá tað snýr seg um orkuslúkar, skulu hesir beinast av vegnum næstu árini, og sum frá líður skal fyritøkan verða somikið væl fyri, at tað einasta, sum hugsast skal um, er at taka tær umhvørvisligu røttu loysnirnar.

- Burðardyggu íløgurnar eru í summum førum størri, tá mann hugsar stutt, men tað góða við hesum er jú, at tær fíggjarliga loysa seg í longdini, sigur Eyðfinn Egholm.

## Bjóða seg fram

Fyri at fáa sum mest burtur úr tí tilfeingi, sum er í fyritøkuni, hevur MEST gjørt av at heita á starvsfólkini um at bjóða seg fram.

- Vit vita, at fólk eru í fyritøkuni, sum hava góð hugskot til, hvussu fyritøkan kann gerast meiri burðardygg, og tí hava vit valt at biðja tey koma við sínum hugskotum, sigur Eyðfinn Egholm.

Ætlanin er so at fáa tey sum hava hug og førleika, at standa fyri onkrum verkætlanum, eins og tey, sum koma við hugskotum, ið kunnu brúkast, fáa okkurt slag av bonus fyri hugskot síni.

# Fimm skjótir spurningar til samskiparan

**Kristianna Winther Poulsen er vegna Atlanticon samskipari fyri EMS-Light verkætlanini í Føroyum. Vit hava sett henni fimm stuttar spurningar um tiltakið og føroysku luttøkuna**



*Kristianna Winther Poulsen*

*Hvat vildi myndugleikin upprunaliga,, at EMS-Light skuldi leiða til?*
EMS light-Nordic er ein norðurlendsk verkætlan (undir Norðurlandaráðnum), sum miðjar ímóti at stuðla burðardyggari menning í teim smáu samfeløgunum í norðurlondum. Høvuðsendamálið fyri verkætlanini er at økja um støðið á verjuni av umhvørvinum og kappingarførinum hjá teim smáu og miðalstóru virkjunum.

*Hvar byrjaði prátið um EMS-Light?*
Ein minni verkætlan varð gjørd fyri at kanna, um tørvur var á eini umhvørvisskipan sum EMS-Light Nordic í Fø, Ísl. Og Álandi. Og tað vísti seg, at tað var tað.

*Nær blivu føroyskar fyritøkur virknar í verkætlanina?*
Í Føroyum byrjaði EMS-Light Nordic tíðliga í 2007. Í mai 2007 var ein byrjanarverkstova hildin. Onkrar fyritøkur eru komnar við í verkætlanina seinni.

*Fáa fyritøkurnar nakað ítøkiligt stempul ella prógv?*
Hetta er ein spurningur um fígging frá Norðurlandaráðnum. Tað er ikki endaliga avgjørt enn, um verkætlanin endar við, at luttakandi fyritøkurnar fáa eitt umhvørvisstempul.

*Hvørjar skipanir/umhvørvisstempul kunnu fyritøkurnar arbeiða fram ímóti, tá ið hendan verkætlanin er liðug?*
ISO 14001 er tann mest nærliggjandi skipanin, sum fyritøkurnar framhaldandi kunnu arbeiða fram ímóti, um ynski er um tað. Hvussu nógv er eftir á mál, tá ið fyritøkurnar hava implementerað EMS-Light Nordic, veldst um, hvussu nógv tær hava gjørt við EMS-Light Nordic. Um tær hava gjørt nógv við at implementera hesa skipan, er munurin ikki so stórur.

*Meira kunning um EMS-Light fæst á www.ems-light.org*